# væl egnaðir






**TIL FELAGS**

*Teir koma ymsa staðni frá, men hava kortini nógv til felags, kunnu tosa um gamlar dagar, um seyð, fisk og annað sum fyriferst í tí dagliga.*

» Eg eri beint nú í ferð við stamp nummar 2 í dag. Og so taki eg ein aftrat, og tá man vera tíð at sleppa sær til húsa aftur



**ÚR ØLLUM ÆTTUM**

*Teir seks ídnu egnararnir á Skála koma úr fleiri ymiskum støðum - Skála, í Skálafirði, Selatrað og heilt norðan frá Gjógv*

» Eg vil næstan siga tað so, at tað sum man ikki fær at vita her, tað fær man neyvan at vita í Sosialinum heldur

## 90.000 pund

Falkurin hjá Sjúrða Joensen er heimahoyrandi her á Skála, men liggur fyri tað mesta norðuri á Eiði. Hetta kemst av, at teir royna mest norðanfyri.

Fiskiskapurin hevur eisini verið góður. Sambært Rudolfi høvdu teir báðir menninir umborð rættiliga góðan fiskiskap í farna mánaði.

- Ikki fyri at reypa, so haldi eg at teir fingu eini 90.000 pund frá jólum og januar mánað út, sigur Rudolf. - Tað ger væl ikki støðuna verri, at Falkurin eisini hevur góðar og trúfastar egnarar.